# Sig heldur sum er – eisini tingmenn!

THORBJØRN BROCHS



Mánadagin 2. oktober í ár hevði Útvarpið, í sambandi við tíðindasendingina, eina samrøðu við ein politist. Evnið var tann ótrygga støðan hjá teimum samkyndu. Sum sendingin var løgd upp, og soleiðis sum samrøðan við politistænastumannin var redigerað inn í sendingina, var boðskapurin greiður:

**"Politiið kann væl verja fólkið móti ágangi, uttan so at tey eru samkynd. Skulu samkynd kunna verjast á jøvnum føti við aðrar føroyingar, má ein nýggj lóggava til, sum er serlig fyri samkynd."**

Seinni bar ein annar politistur sama boðskap fram í Sjónvarpinum. Eg havi ilt við at góðtaka, at tað nakrastaðni í lógini stendur, at samkynd ikki kunnu verjast móti ágangi. So má tað vera tí lógin sigur, at **eingin** kann verjast.

Og tað er helst trupulleikin: Føroyiskt lógarsmíð kundi gott havt hægri raðfesting. Tað er ikki nokk, at tað ikki er loyvt at buka fólk, tú mást ikki sleppa at háða nakran, uttan at verða revsaður. Longu meðan eg var óviti, hevði tað í Noregi avleiðingar, um tú háðaði ella hótti annað fólk. Eg kann ikki hugsa mær, at tað er avtikið, sjálvt um tað er afturi í fimtiárunum.

Men fyri at koma til núverandi støðu í Føroyum, so siga bæði lógin og løgfrøðisliga siðvenjan, at øll eru líka fyri lógini. Hví skal so lógin **ikki vera líka fyri øll?** Um vit gera serlógir fyri ymiskar bólkar, endar tað lætt við, at aðrir bólkar verða funnar at standa uttanfyri, tí teir eru ikki at finna í lógini.

Neyðugt er, at vit fáa eina lóg, sum bannar allan ágang móti fólki. Har má ikki verða tilskilað, hvør er vardur, tí **øll** skulu vera vard. Eingin serlóg má vera, sum skapar iva um, hvørt onkur er undantikin, tí einki undantak má vera. Tingmaður segði í Útvarpinum, at tey samkyndu mugu fáa innivist í revsilógini. Tað hava tey! Har sum onnur hava innivist, har eru tey eisini við. Trupulleikin er, at **eingin** í samfelagnum er vardur móti niðurgering (tvs: sum eg veit um). Sum er, fær politiið einki gjørt - verður sagt - uttan so, at fólk fremja kropsligan ágang. Lógin má krevja, at allur ágangur verður revsaður, antin tað eru orð ella kropsmál sum verða nýtt.

Tað føroyska lógarverkið er hálvgjørt. Eg havi fleiri ferðir uppdagað, at forboð eru lýst við lóg, uttan at nakrar avleiðingar eru nevndar. Er nakar bilsin av, at ein átta ára gomul lóg um endurgjald til sjúklingar ikki kann brúkast til nakað?

**Nýggja arvalóg!**

Kjakið um tey samkyndu hevur nomið við fleiri evnir, sum vit eiga at tosa ordiliga ígjøgnum. Hava t. d. kvinnur og menn rætt til sína egnu ogn? Kann eg gera av, hvør skal arva meg, um eg ikki eigi børn? Tá ið lógin sigur, hvussu nógv børnini hava krav uppá, tá má eg kunna býta alt hitt til hvønn eg vil. Kann eg tað?

Øll skulu hava fullan rætt at gera arvasemju, um børnini harvið ikki missa sín lógarfesta part. Eg haldi hinvegin ikki, at tað bert eru samkynd, ið skulu hava tann rættin. Tað eigur at vera ein mannarættur, men mær vitandi er spurningurin bert tikin upp í samband við kjakið um, hvørt samkynd skulu hava rætt at gera arvasemju. Og tað skulu tey sjálvandi, eins og onnur.

**Sig heldur sum er!**

Tað verður ofta endurtikið, at vit mugu laga okkum til altjóða samfelagið. Vit mugu gerast demokratisk. Eg dugi ikki at síggja annað enn, at vit eru demokratisk. Demokrati er, at fólk velja síni umboð til "parlamentið", og meirilutin har er fólksins og landsins vilji. Soleiðis er í øllum londum, sum verða kallað "demokratisk". Trupulleikin er bert, at vit ikki halda tað sama sum Fogh & Auken ella tílík fólk. Tá ið meirilutin í Føroyum heldur, at fosturtøkan ikki skal vera heilt frí og uttan avmarkingar, so gevur tað Naser Khader rætt at niðurgera føroyska fólkið heilt opið. Í hansara verð er demokrati tað sama sum at vera samdur við honum. Og tað er eisini galdandi fyri donsku pressuni og sjálvandi eisini fyri tað almenna Danmark. Men tað er einki argument móti okkum.

Latið okkum tí bert siga bart út, hvat málið snýr seg um. Vit skulu ikki longur sleppa at halda uppá, at bert hjúnarband er hjúnarband, men at eisini nakað heilt annað skal javnmetast við tí. Har sum hendan fatanin er vorðin lóg, hevur kirkjan ikki longur rætt til at halda upp á Bíbliunnar læru ella sína egnu. Trúarfrælsið er avtikið. Ringast er skilið í Canada og Svøríki. Tú hevur rætt til at prædika eld og svávul. Tú kanst enntá tosa um synd, uttan tann eina, sum ein serlóg er fyri: Homoseksualitet. Hetta er tann lógin, sum tað er so umráðandi at fáa í gildi í Føroyum.

Og nú má eg siga sum er: Eg ivist í, at tey samkyndu sum heild standa aftan fyri ta herferð móti kirkjuni, sum lógarbroytingin hevur verið nýtt til. Sjálvandi ber tað ikki til at gera eina tílíka kanning, men eg kenni ikki tey samkyndu aftur í teirri øsing, sum pressan hevur staðið aftanfyri. Var eg sjálvur samkyndur, hevði eg givið pressuni skyldina fyri teir trupulleikar, sum hon hevði skaffað mær.

Nakað heilt annað: Nú so long tíð er liðin, síðani vit blakaðu hin ómøguliga landsstýrismannin fyri borð, hví eru útlendingamálini ikki loyst??? Tað stendur pressuni frítt at svara!!!

# Homosexualitetur- viðmerking í trimum pørtum (3)

JENIS AV RANA



**Mytan um at Føroya eru einsamallar**

Øtandi verður mangan sagt, at umheimurin ógvast yvir, at Føroyar og føroyingar enn ikki hava góðtikið homosexuellan samlívshátt, sokallaðan partnarskap, adoptiónsmøguleikar fyri homosexuell v.m. Tosað verður, sum um vit eru einasta tjóð og fólk í heiminum, undantikin tey muslimsku, sum ikki hava gjørt tað ónormala normalt.

Havi júst verið á vitjan í Korea. Fregnaðist um støðuna har, um mong sokallað homosexuell vóru, og hvussu lóggávan á tí økinum var. Undrandi hugdu tey at mær, spurdu, hvat eg meinti og gjørdu púra greitt, at mentan teirra als ikki opnaði fyri góðkennan av slíkum ónormaliteti.

Óneyðugt man vera hjá mær at nevna, at heimssamfelagið so gott sum einmælt hevur gjørt av at velja persónliga trúgvandi mann úr júst hesari mentan til aðalskivara Sameindu Tjóða! So her er talan um enn eina ógrundaða mytu, sum enntá Amnesty International, Føroya deild, roynir at breiða út!

Nei, Føroyar eru alt annað enn einsamallar við hugsanum sínum á hesum øki.

**Fordómar og tollindi**

Millum vandamiklastu fíggindar, fólkaræðið hevur, eru fordómar. Hetta at læsa seg fastan í eina uppfatan og nokta at lata seg veg- ella rættleiða. Hyggur tú ígjøgnum tað, ið skrivað verður til frama fyri homosexualitet, tykist alt knívskarpt, antin skalt tú góðkenna hesa villu, ella hatar tú hesi og ert bæði so og so. Og tollyndið, sum jú er ein onnur fortreyt fyri fólkaræðinum, er avmonterað í hesum kjaki.

Longu fyri 2-3 árum síðani kom nýggj definitión av tollyndi á marknaðin, sá hana sjálvur fyrstu ferð í sambandi við ófantaligan sang hjá bólkinum 200. Nú ljóðaði brádliga, at tú nýtist ikki at vísa tollyndi móti slíkum, sum ikki sjálvi vísa tollyndi. Enn eitt lummafilosofi og ein beinleiðis blankokekkur at forfylgja øðrvísi hugsandi, og ein sigandi mótsøgn til orð Hansara, sum biður okkum elska enntá fíggindar okkara.

Fyristilla tær tað lógloysið, ið verður, um slík definitión verður galdandi, at tú bert skal verða góður við/vísa virðing fyri ella elska hann ella hana, ið vísir sama afturímóti- øll hini hevur tú fullan rætt at hata/forfylgja ella vanvirða?

Lat okkum virða hvønn annan, og vera opin fyri broytingum. Loyva tollyndinum framat, og vísa frá okkum allan ágang á næsta okkara, uttan mun til frábrigdi. Tá verða Føroyar kendar- sum fyrimynd fyri tí góða.

**Støða løgmans**

At lesa viðmerkingar løgmans í bløðunum herfyri vaktu í mær minnir um ótespulig skúlaár á Tvøroyri, sum næmingur og seinni sum vikarur, tá forfylging av trúgvandi var dagligur kostur teirra næminga, hvørs foreldur ikki hoyrdu til "røttu" trúarlæruna. Gott at løgmaður talar móti forfylging av annarleiðis hugsandi, men hann eigur at varða seg móti at gera seg sekan í júst hesum sama. At skriva um týdningin av tolsemi, men í somu grein at gera tað mótsatta, hongur ikki saman.

**Hví atkvoddu 20 tingmenn nei?**

Eg ivist ikki í, at tú longu hevur svarað omanfyrisetta spurningi við svarinum: Orsøkinar vóru væl fleiri! Nettupp. Men lesur tú viðmerkingar í fjølmiðlunum, so var tað vegna eina ella aðra mystiska, løgna og ikki minst konservativa bíbliuuppfatan, at úrslitið gjørdist tað, tað varð!

Og hendan sjálvgjørda fatanin verður so brúkt til at manipulera og jagstra hesar, sum á fult demokratiskan hátt atkvøddu á Løgtingi og feldu eitt uppskot frá tveimum tingfólkum. Miðvíst verður so fólkaræðið og Bíblian, orð Guds, traðkað undir fótum og virðingin viknar. Bert er at vóna, at politikkarin er uppgávu sína verdur, ikki støkkur undan og letur útlitini fyri løtuvinningi vinna á tí ábyrgd, hann tók á seg, dagin tá Føroya fólk leit honum ábyrgdina av leiðslu landsins í hendur.

**Samanumtikið:**

Kjakið um viðurskifti teirra, ið velja at liva lív sítt sum homosexuell:

... byggir ikki á hagtøl, ið halda.

...er mangan óreiðiligt og merkt av fordómum.

...tolsemi hevur lítið og einki rúm í hesum kjaki.

... nøkur fjølmiðlafólk fremja beinleiðis øsing í staðin fyri at hjálpa til við at loysa trupulleikan.

... løgreglufólk røkja ikki uppgávur sínar- og blanda seg beinleiðis í politikk.

... lítil áhugu tykist vera at finna tey, ið happa og forfylgja homosexuell.

... orsøkin til hesa happing og forfylging er ikki at finna hjá politikkarum ella í ávísari lóg.

... tú svíkur hesi bundnu, um tú gevur eftir fyri víðgongdum bólkum og normaliserar tað ónormala.

... uppáhaldini um viðføddan eginleika er ógrundað.

... at siga at tey, ið hava Bíbilsku hugsanina um homosexualitet, sjálvi stríðast við slíkar tráanir, er vánalig lummafilosofi.

... tey, ið velja at liva eitt lív sum homosexuell, liva eitt vandamikið og neyðarsligt lív.

... vendir tú tær til Skaparan, verður tú fyrigivin og loystur frá trældómi tínum.

... at liva sum homosexuellur hevur einki við sjúku at gera, men er eitt val- ein lívsstílur.

... orð Guds boðar ongastaðir, at homosexuellur liviháttur er verri enn onnur misbrot og syndir.

... Bíblian ger greitt, at sum mann og kvinnu/ kall og konu skapti Gud menniskjað

... Bíbilska uppgáva menniskjans er: at nørast og fylla jørðina.

Keldur: Bíblian

NOVA- rapporten, levevilkår & livskvalitet blandt lesbiske kvinner og homofile menn, 1999
Homofile og selvmordsforebygging, dec. 2002, LLH & Kirkens SOS
Roman Homosexuality, Craig A Williams, Oxford Univ. Press,1999
Homofili og Kristen Tro, - et felleskirkeligt ressursblad, Okt.2003
Straight & Narrow, Thomas E.Schmidt, Downers Grow, IVP
Norsk homoforskning, M.Bransæter m.fl., Universitetsforlaget 2002
Nova rapporten, en evaluering, Sigurd Skirbekk, sosiologiprofessor, 2000
År 2000´s Falne Guder og den nye verdensordning, Aril Edvardsen, Logos 1999
Journal of sex research, 2002
Tíðarritið Nature, dec. 92
www.homofili.com www.exodus-international.org
Samheitaorðabókini, forlagið Stíðin, 2000
Donsk- føroysk orðabók- Johannes av Skarði og Jóhan H. W. Poulsen, ískoytið 1977
Journal of the American Medical Accosiation, 1998
Robert Spitzer, psykiatari, www.newdirection.ca
Merton Strommen, kirken og homoseksualitet, Luther forlag 2001.